# Laila Hentze



***Hvussu fert tú at halda jól í ár?***

Heima saman við familjuni. Ætla í kirkju um dagin, og um kvøldið kemur familjan. Vit vera 14 fólk hesu ferð. Vit taka okkum góða tíð at nýta døgverðan og síðani pakka vit gávurnar út. Eitt av børnunum í familjuni lesur jólaevangelium, vit dansa um jólatræið og syngja jólasangir. Síðani fáa vit okkum mandlurís. Á midnátt kemur pávin í Rom innar í stovuna. Í 1990 var eg við studentaflokki mínum í Rom í audiens hjá táverandi pávanum, so tað er hátíðarligt at fylgja við í sjónvarpinum, tá ein hevur verið har.

***Hvat etir tú til døgurða á jólum?***

Gás og dunnu og so mandlurís omaná.

***Hvat er tað besta við jólum?***

Hugnin at vera saman við familju og vinfólki.

***Hvat er minni gott við jólum?***

At nógv verða ovbyrjað á jólum og tað er ikki endamálið við høgtíðini.

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***

Ja, nakrar ferðir. Einaferð hildu maðurin og eg jól einsamøll. Tað var stak hugnaligt og friðarligt. Vit vóru í kirkju, men prestur hevði gloymt tað mesta av taluni heima, so talan vardi bert 5 minuttir. Aftaná 40 minuttir var guðstænastan liðug og vit gingu heimaftur, har vit fingu okkum dunnu. Vit høvdu einki jólatræ, tí vit vóru lesandi, men funnu upp á ráð og brúktu eina stóra plantu sum jólatræ. Síðani vitjaðu vit vinfólk hinar dagarnar. Eitt annað árið var øll verfamiljan samlað í Danmark, og tey jólini vóru meira lík teimum, vit plaga at halda heima í Føroyum - tó vóru vit meira úti og gingu túrar í skóginum og á strondini.

***Hvønn jólatónleik dámar tær best?***

Bæði føroyskan og útlendskan jólatónleik.

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***

Klæðir.



















